# Thor Chaser nýmálaður á Klaksvíkar Sleipistøð

**– Nú vit hava fingið fast samband við meginøkið, er einki til hindurs hjá okkum at arbeiða umborð á skipum, sum liggja aðrastaðni enn í Norðoyggjum, sigur fíggjarleiðarin á Klaksvíkar Sleipistøð, Finnur Jacobsen**




*Thor Chaser er millum tey størru skipini, sum Klaksvíkar Sleipistøð hevur havt uppi á bedingini Mynd: Vilmund Jacobsen*

HANDVERKSVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eitt av skipunum hjá reiðarínum Thor í Hósvík, Thor Chaser, sum hevur sítt virksemi í oljuvinnuni, stendur í hesum døgum á bedingini hjá Klaksvíkar Sleipistøð.

Aksilin skal úr skipinum, og ætlandi skulu skrúvublød eisini skiftast. Skipið er annars til vanligt viðlíkahald, har tað er málað uttan- og innanborða.

Bedingin á Kósaskákinum, sum staðið norður ímóti Kósavirkinum verður rópt, kann taka skip upp á vognin, sum í mesta lagi viga 800 tons.

Finnur Jacobsen, sum er fíggjarleiðari á Klaksvíkar Sleipistøð, sigur, at Thor Chaser er millum tey størru skipini, sum teir hava havt uppi á bedingini.

– Vit hava eisini havt ídnaðarskipið, Bettinu, uppi, og tá brakaði eitt sindur í bedingini, sum hann tekur til.

Tað hendi tó einki við gomlu bedingini, sum hevur sín uppruna heilt aftur til 1928.

### Øll línuskipini

Finnur sigur, at línuskipini í Klaksvík eru ikki størri enn tað, at tey øll kunnu takast upp á bedingina.

– Jákup B er eitt sindur longri enn hinir bátarnir, men hann er heldur eingin trupulleiki.

Fíggjarleiðarin sigur, at flestu línubátarnir, sum eru heimahoyrandi í økinum, javnan verða tiknir upp á Klaksvíkar Sleipistøð til botnreinsingar, máling og skift av sinki.

Í Klaksvík liggja tvær bedingingar lið um lið, men tann innara, Klaksvíkar Skipasmiðja, er nógv minni enn hin ytra.

– Her norðuri verður Klaksvíkar Sleipistøð vanliga rópt bedingin, meðan hin verður rópt lítla beding, sigur Finnur.

Á Klaksvíkar Sleipistøð arbeiða einir 20-25 mans, harav nógv teir flestu eru maskinarbeiðarar og taka sær av maskinumvælingum og umvælingum av spølum og øðrum.

### Mest maskinarbeiði

– Vit gera bæði stál-og timburarbeiði, og hóast seinasti skipstimbrarin var útlærdur á Klaksvíkar Sleipistøð einaferð í sekstiárunum, eru kortini einir tveir skipstimbrarar framvegis í arbeiði á bedingini, sigur Finnur Jacobsen.

Umframt arbeiði, sum gjørt verður, meðan skipini standa á bedingini, arbeiða menninir eisini umborð á skipum, sum liggja við bryggju.

– Vit hava verið nógv umborð á skipunum her norðuri, og vit hava eisini verið umborð á skipum hiðani úr økinum, sum hava ligið aðrastaðni enn í Norðoyggjum.

Finnur Jacobsen sigur, at menn hjá Klaksvíkar Sleipistøð enntá hava verið umborð á trol- og nótaskipinum, Norðborg, meðan skipið hevur ligið í Íslandi.

### Betraðir møguleikar

– Nú vit hava fingið fast samband við meginøkið, er einki til hindurs hjá okkum at arbeiða umborð á skipum, sum liggja aðrastaðni enn í Norðoyggjum, sigur fíggjarleiðarin á Klaksvíkar Sleipistøð.

Finnur Jacobsen heldur, at eitt ávíst pontentiali liggur í, at fast samband nú er um Leirvíksfjørð.

---

Klaksvíkar Sleipistøð:

# Ein søgulig beding á Kósaskákinum



*- Endamálið við keypinum av bedingini í 1994 var at endurskapa okkum arbeiðsplássið, sum var farið á húsagang og lá við ongum virksmi, sigur Finnur Jacobsen, fíggjarleiðari á Klaksvíkar Sleipistøð*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Bedingin á Kósaskákinum í Klaksvík, Klaksvíkar Sleipistøð, hevur sín uppruna heilt aftur til 1928. Tað var Kjølbro, sum legði lunnar undir hesa beding, sum upprunaliga varð keypt brúkt úr Svøríki**

HANDVERKSVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Klaksvík vóru eingir møguleikar at taka skip upp, fyrr enn Kjølbrofyritøkan saman við Dáva í Gerðum sá, at her mátti vend koma í. Hetta var í teirri tíðini, tá ið trímastraðu skonnartirnar byrjaðu at koma.

Finnur Jacobsen, sum er fíggjarleiðari á Klaksvíkar Sleipistøð, veit at siga, at Kjølbro og Dávur í Gerðum í sínari tíð keypti eina brúkta beding, sum var tikin niður í Svøríki.

Eigaraviðurskiftini millum Kjølbro og Dáva í Gerðum vóru, at Kjølbro átti 2/3 og Dávur 1/3.

– Hetta er sama beding, sum vit hava í dag. Í stórum er hon óbroytt, men við tíðini eru ymiskar betringar framdar.

Hann vísir á, at stoypt er uppundir skinnararnar av nýggjum, og skinnarar eru skiftir.

– Men prinsippið við bedingini og arbeiðshátturin er hin sami sum í sínari tíð, sigur hann.

### Á húsagang

Í nógv ár var Kjølbro ein stór samlað fyritøka, men í 1988 vórðu partar av fyritøkuni skipað sum dóttirfeløg. Millum hesi feløg var eisini bedingin.

– Eins og mangt annað vinnuligt virksemi, megnaði bedingin ikki at hóra undan kreppuni fyrst í nítiárunum og fór á húsagang.

Finnur sigur, at við ársenda í 1994 keyptu 17 av teimum, sum áður høvdu arbeitt á bedingini, fyritøkuna frá Ny Kredit.

### 13 eigarar í dag

– Endamálið við keypinum var at endurskapa okkum arbeiðsplássið, sum var farið á húsagang og lá við ongum virksmi.

Finnur Jacobsen sigur, at eingin nýggjur parteigari er komin upp í felagið hesi árini síðan keypið, men onkur er farin burtur úr.

Í dag eru teir 13, sum eiga Klaksvíkar Sleipistøð.